# Hvassur stormur rakar Føroyar í nátt

**Eitt sera djúpt lágtrýst nærkast Føroyum í kvøld og verður yvir okkum um midnáttarleitið. Hetta hevur við sær hvassan storm av vestri og landnyrðingi, og tí eiga bjargingarfeløg og onnur at verða til reiðar, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur**

STORMUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Lágtrýstið, sum rakar Føroyar í kvøld, verður mett at vera 947 hPa. Hetta er sum sagt sera djúpt, tí lágtrýst verða mett sum DJÚP, tá tey liggja undir 950*

*savnsmynd: Jens Kristian Vang*

Bjargingarfeløg og onnur hjálparfólk eiga at vera til reiðar í kvøld.

Tað sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, tá Sosialurin hittir hann til eitt prát um veðrið tað næsta samdøgrið.

Veðrið hevur ikki verið nakað serligt í seinastuni. Í gjár lá Norrøna og bíðaði eftir líkindum til at leggja at bryggju í Havn. Í Norðdepli reiv tann nógvi vindurin part av eini tekju og klæðningin av einum húsum í Norðdepli, í Vági koppaði jólatræið, sum stóð á fløtuni við minnisvarðan, og veðrið í kvøld verður valla frægari. Tvørturímóti.

Sambært Peturi Skeel verða Føroyar raktar av einum óvanliga djúpum lágtrýsti í nátt.

Helst verður eitt skifti lítið av vindi tíðliga í kvøld, men eftir midnátt rakar lágtrýstið landið, og út á náttina sigur hann frá hvøssum stormi av vestri og landnyrðingi. Í veðurfrøðini verður hvassur stormur flokkaður upp í 23 til 28 metrar um sekundið.

Nógvi vindurin minkar tó út ímóti morgni, og um middagsleitið í morgin og seinnapartin skuldi vindurin verið minkaður til 12 til 17 metrar um sekundið.

## Ódn í hvirlum

Hvørjar avleiðingarnar av nógva vindinum í kvøld koma at verða, er ilt at siga, tí ofta kenna fólk ofta best sjálv, hvussu ættin av vestri og landnyrðingi ávirkar júst teirra bygd ella bý.

Tó kann tað verða ein sannroynd, at hvassi stormurin kann umskapast til ódn í hvirlunum, tí í slíkum førum hava fjøll o.t. nógv at siga, hvussu vindurin rakar tey ymsu støðini, og í ódn er talan um vindmegi oman fyri 32 metrar um sekundið.

Petur Skeel Jacobsen væntar ikki, at miðalvindurin kann koma upp á ódn í kvøld, men Akrabergi og Mykinesi, har vindurin ofta er mestur, kunnu vindmátararnir koma at vísa vindmegi upp í 50 metrar um sekundið í kvøld.

Lágtrýstið, sum rakar Føroyar í kvøld, verður mett at vera 947 hPa. Hetta er sum sagt sera djúpt, tí lágtrýst verða mett sum djúp, tá tey liggja undir 950. Vanliga verða lágtrýst mett at liggja millum 970 og 990 hPa, sigur Petur Skeel Jacobsen. Til samanberingar kann nevnast, at tá jólaódnin herjaði landið í 1988, var lágtrýstið skrásett at vera 937, tvs. tíggu hPa djypri± enn lágtrýstið í kvøld.

Eingi beinleiðis hagtøl um lágtrýst eru eins og t.d. veðurfrøðingar skráseta vindmegi, hiti og avfall. Vindmegin í ódnini í 1988 og í kvøld kann tó ikki samanberast. Tá kom vindmegin upp í eini 70 til 80 metrar um sekundið, men tó skal vindmegin í kvøld takast í álvara. Og tað verður hon eisini. Petur Skeel Jacobsen vísir á, at tey sum síggja DR1 hava møguleika at fylgja við lágtrýstinum har, tí vanliga verður bert hitin í Havn vístur á veðurkortinum hjá Danmarks Radio, men í hesum døgum verður vindmegin eisini víst á skíggjanum hjá donsku tjóðarrásini, og tað sigur Petur Skeel seg ikki hava sæð áður, og tí verður eisini fylgt við veðrinum í Føroyum í kvøld millum útlendskar veðurfrøðingar.

Tí viðmælir Petur Skeel, at bjargingarfeløg og onnur vera á varðhaldi, tá Føroyar eftir øllum at døma verða raktar av hvøssum stormi í nátt



*Petur Skeel Jacobsen heitir á bjargingarfeløg um at vera á varðhaldi í nátt*

miðlahúsið í Vágsbotni




**Hvønn dag í januar mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.**

**Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**

**Sendið okkum loysnirnar innan 3. februar og viðmerkið brævbjálvan "Sudoku".**

**Vinningurin er ein Samsung E730 + eitt Teletíðarhald frá Føroya Tele. Virði 3.295 kr.**

**Henda fartelefonin hevur so at siga alt sum skal til í eini fartelefon. Megapixel-kamera, video, MP3, Bluetooth, FM-radio, 96 Mb minni v. m. Eisini hevur E730 ein TFT-skerm við 262.000 litum.**

**Drigið verður í fyrstu vikuni í februar**

FØROYA TELE

# SUDOKU JANUAR KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | | | 9 | | | | 4 | 2 |
| 8 | | | 6 | | 3 | 1 | | |
| | 5 | 9 | | | 4 | 7 | | |
| | 1 | 6 | 4 | | 7 | | 5 | 8 |
| | | | | | | | | |
| 4 | 2 | | 1 | | 8 | 6 | 3 | |
| | | 4 | 7 | | | 2 | 1 | |
| | | 3 | 8 | | 1 | | | 9 |
| 9 | 7 | | | | 2 | | | 4 |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 3 | | | | 6 | | 9 | |
| 7 | | | | | | | | |
| | 1 | 2 | | 9 | 8 | | | |
| | 5 | 4 | | | 1 | | | 8 |
| 3 | 6 | | | | | | 1 | 2 |
| 1 | | | 9 | | | 7 | 4 | |
| | | | 6 | 2 | | 3 | 7 | |
| | | | | | | | | 4 |
| | 9 | | 8 | | | | 6 | |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 3 | | | | 5 | 4 |
| | 6 | | 9 | | | | 7 | |
| | 2 | | | | | 9 | | 1 |
| 6 | | | 8 | 7 | | | | |
| | | 2 | | 5 | | 7 | | |
| | | | | 9 | 4 | | | 5 |
| 5 | | 6 | | | | | 4 | |
| | 1 | | | | 9 | | 3 | |
| 8 | 9 | | | | 2 | | | |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 5 | 7 | | | | 2 |
| 4 | | | | | | 3 | | |
| | | | 9 | | 2 | 1 | 7 | |
| | | 3 | | | | 7 | | |
| 7 | | | | 8 | | | | 3 |
| | | 4 | | | | 6 | | |
| | 1 | 2 | 8 | | 9 | | | |
| | | 6 | | | | | | 8 |
| 8 | | | | 6 | 1 | | | |

TRUPUL

NAVN: ______________________ BÚSTAÐUR: ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin | Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00 Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www. sosialurin.fo